# FÖROYAR

FÖROYINGAFELAG GAV ÚT

TÓRSHAVN 1946

## Formæli.

Föroyingum stendur nú í boði at taka við ognar- og yvirvalds-rættinum til land sítt, Föroyar.

Tjóðarviljin er tann, at tikið verður við hesum rætti: at vit sjálvir eiga landið og sjálvir ráða yvir tí.

Föroyingar mugu tí vita, hvussu teir skulu rökja og umsita henda ognarlut sín.

Til tess at gera fyrireikingarstarv hesum viðvíkjandi hava menn og kvinnur — úr öllum politiskum flokkum her á landi — stovnað felagsskap. Hetta er *Föroyingafelag — Felag fyri Föroya frælsi*.

Tey uppskot, sum hesin felagsskapur hevur latið gera, verða kunngjörd Föroya fólki í hesum riti sum her er prentað.

Hetta eru sjálvsagt *bert uppskot. Hvussu land okkara fer at verða stýrt*, hvört tað verður nakað soleiðis sum her verður skotið upp ella á annan hátt, tað fer fólkaviljin — fyrst og fremst soleiðis sum hann kemur til sjóndar í politiskum flokkum á fólkavalda lóggávutingi landsins — at ráða fyri. Eyðvitað ber til at stýra og umsita landið á mangan annan hátt og betri enn her er greitt frá. Tað sum *hetta rit* hevur sett sær fyri er við orðum og tölum: 1. at prógva, at land okkara *kann* skipast sum frítt og frælst ríki og 2. at vísa á *eina av teimum mongu leiðum* sum föra á hetta endamál.

Hesi formælisorð biðja vit fólk at hava í huga, tá tey lesa hetta rit.

*Tórshavn í august 1946*

*FÖROYINGAFELAG*

## Ognarrætturin til Föroya.

Föroyska fólkið og fólkið alt eigur Föroyar.

Á hesum grundarlagi skal skapast framburður her á landi, soleiðis at fólkið sum heild og hvör einstakur fær trygg líkindi fyri veksandi andligari og vinnuligari menning.

Henda ognarrætt og henda framburð skulu vit tryggja okkum: 1. í starvi okkara út eftir, í viðurskiftum okkara við aðrar tjóðir og 2. í starvi okkara inn eftir, í tí starvi sum vit avrika á hinum ymsu ökjum samfelagslívsins: stjórnarligum, vinnuligum, sosialum, heilsuligum, tjóðskaparligum, menningar- og menntaligum o. s. fr.

## Uttanlandaviðurskifti.

**Danmörk serstakliga.** Um viðurskifti Föroyinga við Danir er hetta at siga: Föroyingar hava hesi frændtjóð nógv gott at bera. Vit duga at meta og virða tað starv í menning og vinnu sum hon hevur avrikað í sínum landi. Við hana vilja Föroyingar halda vinarlagi og vónandi eisini samvinnu eins og við aðrar frænd- og grannatjóðir. Vit vátta henni eisini tökk fyri at hon fyrst av öllum tjóðum hevur viðurkent tjóðarrættindi okkara. Men tað stjórnarlag sum vit hövdu undir Danmörk var okkum ikki hent, heldur til mikla óeydnu. Hevur hetta skapt ósemju millum hesar báðar tjóðir — ósemju sum til ógagns hevur verið fyri báðar. Men tá nú hetta stjórnarliga band fellur burtur er einki sum tálmar góðum frændsemi, vinarlagi og samvinnu í framtíðini.

Uttanríkispolitiskt koma viðurskifti Dana og Föroyinga at liggja greið. Danska stjórnin segði seg longu í oktobir í fjör og

nú aftur í ár at vilja viðurkenna sjálvstöðisrætt okkara. Hesa viðurkenning fáa vit so statt samstundis sum sjálvstöðið er fingið, og man danska stjórnin fara at boða öðrum ríkjum frá, at hon hevur givið okkum hesa viðurkenning.

Tá Föroyar og Danmörk skiljast politiskt verða hesi bæði lond at gera upp fyrrverandi felagsbúgv.

Slík uppgerð kann t. d. fara fram soleiðis, at vit royna at rokna í peningi tað „tap“ sum Föroyar hava havt av sambandinum við Danmörk og frá hesum draga tann „vinning“ sum Föroyar hava havt av tí. Munin átti so Danmörk at gjalda okkum.

Tað er valla ivamál, at slík uppgerð, har Föroyingar fingu skaðabötur fyri tey töp, teir hava havt av at vera undir Danmörk, er rættvís. Annað er, hvört slík uppgerð í tölum er gjörlig. Her eru nógvar flökjur sum als ikki greiðast. Hvussu skulu vit t. d. rokna tað tap sum föroyskt vinnulív, fyrr og seinni, hevur havt av teimum höftum sum Danmörk hevur lagt á tað og hvussu skulu vit í krónum og oyrum rokna tað tap sum tjóðskapur okkara og menning gjögnum öldirnar hava havt av ávum Danmmarkar? Slíkt verður ógjörligt.

Av hesum og mongum öðrum orsökum munnu tað vera bestu hyggjuráðini at vit líta ikki á uppgerð okkara við Danmörk úr trongum peningaligum sjónarmiði. Vit skulu ikki vera smáligir, og tá vit hava fingið sjálvstöðið og eru farnir at rökja tað, hevur peningarúgva, lat hana vera fitta og drúgva, lítið og einki at týða.

Tað man tí vera best, at uppskot okkara um uppgerðarsáttmála við Danir verður tað, at Föroyingar siga: vit gera upp á miðjuni, vit lata farið vera farið, aftur í móti at Danir sínu megin siga: vit lata farið vera farið. Sjálvsagt ber til at gera undantök í einstökum förum frá hesi aðalreglu.

**Uttanríkismál yvirhövur.** Sum nevnt fer Danmörk at boða öðrum ríkjum frá, at hon viðurkennir sjálvstöði Föroya. Sjálvir mugu vit so boða öðrum ríkjum frá at vit hava stovnað ríkið. Aðalstörv okkara í uttanríkismálum verða annars í stuttum hesi:

1. Sjálvstöði landsins í framtíðini skulu vit tryggja í sáttmálum við onnur ríki, har slíkt er gjörligt.
2. Föroyar skulu eftir förimuni taka lut í samstarvi við onnur lond og serstakliga slíkum sum bera við hövuðsvinnuveg okkara, fiski- og sjóvinnu.
3. Föroyar skulu eftir förimuni hava holla og góða samvinnu við hini Norðurlondini, serstakliga í menningarmálum.

**Handils- og vinnumál serstakliga.** Föroyingar framleiða matvörur og annað fyri onnur lond og fáa í býti slíkt sum teimum törvar, men sum ikki verður framleitt í landinum. Föroyingar hava bæði rættindi og skyldur í hesum millumlanda vörubýti. Teir skulu tí taka lut í millumlanda samráðingum og gera sáttmálar við onnur lond um handils- og vinnumál. Vit mugu her fyrst og fremst stevna í móti:

1. at fáa í lag lagaligar sáttmálar um sölu okkara og keyp í útlondum,
2. at royna at fáa sjómarkið um Föroyar flutt longur út, so fleiri fiskimið verða friðað.

## Innanlandaviðurskifti.

**Stjórnarskipanin.** Föroyar verða frítt tjóðveldi. Gerðavaldið, tað útinnandi valdið, verður hjá fólkavaldum forseta. Lóggávuvaldið verður hjá fólkavaldum tingi og forseta í felag. Dómsvaldið verður hjá óheftum dómstólum. Forseti stjórnar við ráðharrum, sum skulu hava álit meiriluta tingsins (parlamentarisma, tingræði). Reglurnar um stjórnarskipanina verða skrivaðar í stjórnarskrá (grundlóg). Hesar reglur eru í aðallutum tær somu sum í öðrum Norðurlondum (Danmörk, Svíaríki, Noregi og Íslandi). Har eru so statt reglur um tal- og ritfrælsi, trúfrælsi, friðhalgi bústaðar og ognar o. s. fr. Har eru eisini reglur um vinnufrælsi, um rættin til forvistar (forsorg) fyri gomul fólk, sjúk og onnur sum ikki eru sjálvbjargin.

Her aftast í ritinum er sett fram stjórnarskráaruppskot.

**Embætisverkið.** Embætisverkið verður í hövuðsdráttum skipað soleiðis: Hægsti embætismaður er *forsetin* sum nevndur var oman fyri. Hann setur ráðharrar í og úr embæti. Forseti og ráðharri seta aðrar embætismenn ríkisins í og úr embæti.

*Ráðharrarnir* verða 3 í tali. Við fyriskipan verður starvsöki teirra ásett. *Ein* hevur undir sær dómsmál, lögreglumál, skúlamál, menningar- og menntamál, sosial mál, heilsumál, kirkjumál, kommunumál. *Annar* hevur: almenn fíggjarmál, samgongumál (vegir, havnir, telefon, útvarp, postverk, vitaverk), vinnumál (landbúnað, fiskivinnu, handverk, ídnað), handils-, peninga- og bankamál. *Triðji* rökir uttanríkismál landsins.

Ein av hesum er samtíðis *forsætisráðharri*.

Undir hesi hægstu stjórn koma lægri stig:

*Ríkisbókhaldari. Roknaskapargrannskoðarar. Lögreglustjóri (fúti)* verður 1 fyri alt landið. Undir honum sýslumenninir. Í skúlamálum: *skúlastjórar og skúlalærarar.* Í kirkjumálum: *bispur* og *prestar.* Í heilsumálum: *landslækni, fylkislæknar og sjúkrahúslæknar.* Har umframt ymisk *forstjórastörv í almennum verkum*.

Undir uttanríkisráðnum eru *umboðsmenn landsins í útlondum*.

Nærri upplýsingar um embætisverkið fáast í fíggjarlógaruppskotinum her aftan fyri í bókini.

**Dómsstólarnir.** Um dómsstólarnar eru reglur í stjórnarskránni og í serstökum lógum. Í landinum er undirrættur við 1 dómara og hægri rættur við 3 dómarum.

**Búskapar- og vinnumál.** Grundarlagið sum föroyskt vinnulív byggir á er: 1. náttúrríkidömi landsins, 2. arbeiðsmegi fólksins, 3. framleiðsluamboðini, vit eiga, og 4. tað vit eiga til góðar hjá öðrum londum.

*Náttúrin* veitir okkum möguleika til at framleiða vörur sum vit annað hvört sjálvir kunna nýta ella sum vit kunna lata aðrar hava í býti fyri mangt og hvat, sum okkum törvar, men sum vit ikki framleiða sjálvir.

Á landi eiga vit fyrst gröðina: gras, epli, rötur, korn, grönmeti o. s. fr. og tað sum ber til at ala fram og seta við: seyð, neyt, ross o. s. fr. So eiga vit fossarnar, sum veita okkum ljós, hita og kraft. Har næst eiga vit í undirgrundini: kol, leir og annað, og vit eiga sand og grót til byggievni.

So eiga vit sjógvin við fiskimiðunum, grind, stórhvali og fugli. Og umframt hetta er sjógvurin samgonguleið — ódýrari enn nökur onnur. Og nógvar framúr góðar náttúrligar havnir eiga vit.

So er tað *fólkið*. Vit eru 30.000 í tali. Tað er ikki nógv. Av hesum standast so ymsir meinbágar — tað er greitt. Men eisini nógvir fyrimunir — tað er eisini vist. Og minnast mugu vit, at eru vit fá, so hava vit eisini færri munnar at metta. Og hvör maður hevur bert ein munn at eta við, men tvær hendur at arbeiða við.

Hesar hendur duga og vilja arbeiða. Tað er ikki hin einstaki fiskimaður, hin einstaki bóndi, hin einstaki smiður, sum hevur skuldina fyri at vinnulív okkara er so illa fyrikomið, sum tað er. Ótrúligt er tað knoss og baks sum hesir hava livað undir — mann av manni — alt fram á henda dag. Og ikki hevur húsmóðirin ligið á löttum heldur.

Fólkið er eisini væl útbúgvið við yrkiskunnleika. Sjómenn og böndur nema sær störri og störri kunnleika og betri og betri

hegni og arbeiðslag. Vit eiga handverksmenn í öllum greinum sum törvur er á her á landi.

Við *amboðum* eru vit aftur í móti ikki so væl útgjördir. Landbúnaðurin eigur lítið av góðum reiðskapi og hentum bygginguni. Seyða- og serstakliga neytaskipanin er lítil. Vit hava ov fá fiskiför. Handverks- og ídnaðarvirkini, serstakliga fiskaídnaðarvirkini, eru fá ella eingi. Vit eiga nakað av havnum, brimgörðum og lendingum, nakrar vegstubbar her og har. Telefonverkið er slitið. O. s. fr. Men á berum botni standa vit tó ikki, og farna friðarárið hevur framleiðsluútbúnaður okkara verið böttur nógv og öktur.

So er *tað sum vit eiga hjá öðrum*, t. e. tað sum Onglendingar enn skylda Föroyingum fyri fiskin teir seldu teimum í stríðsárunum og alsamt selja. Fyri hesar sterlingsognir okkara kunnu vit keypa okkum framleiðsluútbúnað: skip, amboð og tilfar til at smíða skip og amboð av.

Burtur úr hesum sum her hevur verið nevnt: náttúrríkidömminum, arbeiðskrafti fólksins, tí framleiðsluútbúnaði sum vit longu nú eiga og so í tí framleiðsluútbúnaði sum vit kunna keypa fyri sterlingsognir okkara í Onglandi, kunna Föroyingar leggja trygt grundarlag undir vinnulív sítt í framtíðini.

Fá eru tey lond sum í dag hava betri líkindi enn Föroyingar. Her velst bert um viljan hjá Föroyingum sjálvum til at nýta hesi líkindi.

Okkara vinnulívsstarv má hava endamál at stevna í móti og hetta endamál eigur at vera tað, at *öll fólk hava arbeiði og slíkt arbeiði sum gevur hvörjum einstakum og landinum sum heild störstan vinning*.

Tað sum vit fara at framleiða í hesum okkara samfelagi, har öll hava arbeiði, er hetta:

*Í landbúnaðinum:* alt tað kjöt, alla ta mjólk, öll tey egg, öll tey epli, allar tær rötur, alt tað grönmeti sum nýtt verður í landinum — soleiðis at vit nýtast ikki at keypa hetta frá öðrum.

*Av sjónum:* fisk og annað, so mikið at vit fáa nóg miklan innflutning av amboðum og vörum, sum okkum törvar, men sum vit ikki kunna gera sjálvir.

*Í handverki og ídnaði:* fyrst og fremst vörur virkaðar burtur úr rávörum landsins — landbúnaðarvörum og fiskavörum — til heimanýtslu og til útflutnings. Í öðrum lagi vörur virkaðar úr útlendskum tilfari til heimanýtslu: skip, amboð og annað tílíkt til vinnuvegirnar.

Fyrsta treytin fyri at koma á hetta mál er eyðvitað at hin einstaki maður og hin einstaka kvinna sýna persónligan dugnaskap

og framtakssemi. Slíkt hevur ikki trotið higar til og fer heldur ikki at tróta í framtíðini.

Onnur treytin er tann at stillað verður soleiðis fyri at hesin dugnaskapur hjá tí einstaka sleppur at vísa seg í verki. Vit mugu skapa samfelag okkara soleiðis at vinnulívið trívist. Her verður tað lóggávutingið sum við lóggávustarvi sínum leggur hövuðsgrundarlagið og síðani gerðavaldið, sum setur hesar lógir vinnulívinum viðvíkjandi í gerð.

Her eru nógvir byggingarmöguleikar og ymiskar hugsanir um hvörjir eru hentastir og bestir. Og vit finna sjálvsagt ikki skipan fyri búskapi okkara og vinnulívi sum verður standandi óbroytt í komandi árum. Vit böta tvörtur í móti um hana og ökja so hvört sum vit fáa betri royndir og so hvört sum vinnulívið tekur seg fram og veksur.

Tað sum er at gera í fyrstu syftu er hetta:

Lóg um peningaverk landsins og lóg um bankaverkið. Landsbankin hevur í hondum umframt bankayrki eisini tað almenna lánsstarvið (vinnulánsgrunnurin o. a.) og so valutamálini.

Peningamál, lánsstarv, valutamál og so eisini prísir og lönir innanlands og alt sum undir hetta kemur verður undir fastari leiðslu, og teir sum her valda eru ábyrgir fyri landsins stjórn.

Tollmálini skulu lagast eftir törvum vinnulívsins og somuleiðis onnur almenn fíggjarmál.

So eru aðrar uppgávur: samgonguverkið verður bött og ökt eftir törvum vinnulívsins sum heild. Somuleiðis fossamagnið. Hesar og aðrar fyritökur eru annað hvört so stórar at einstakir menn ella einstök felög orka ikki at fara undir tær ella hava eisini so stóran týdning fyri alt vinnulív landsins, at einstökum monnum ella einstökum felögum verða ikki litnar tær upp í hendur.

Tað sum nú í lötuni mest troðkar á er at endurnýggja tey framleiðslugögn sum slitin eru í stríðsárunum. Og skal hin föroyski fiskimaður, hin föroyski bóndi, hin föroyski smiður vera kappingarförur mátvegis starvsbröðrum sínum í útlondunum, er ikki nóg mikið at hava amboð, tey mugu eisini vera tíðarhóskandi út í odd og egg. Vaðbeinið og annar avoldaður reiðskapur, sum bert elur svangan búk og sveittan skalla, skulu vera avlögd sum skjótast sum hövuðsamboð í okkara vinnu. Bert tey bestu amboð eru nóg góð fyri okkara fiskimenn, fyri okkara jarðamenn, fyri okkara handverksmenn, fyri okkara arbeiðandi fólk yvirhövur.

Sum áður nevnt er longu nógv av framleiðsluamboðum komið til landið og fleiri eru vissað landinum. Hetta eru tó mest fiskiskip sum fingin hava verið. Av öðrum amboðum hevur verið lítið fingið til landið. Fyri at fáa hetta í lag og fyri at fáa endur-

nýggjanina í framleiðsluútbúnaði okkara yvirhövur í trygga og fasta legu skulu vit ganga hesar leiðir:

1. Landsbankin fær rætt og skyldu til at keypa allar ognir í útlendskari valutu sum til eru her á landi og sum útflutningur okkara og annað framvegis vinnur inn. Landsbankin rindar eigaranum við egnu krónum sínum, og verður virðið á föroysku krónuni ásett soleiðis, at 19,34 krónur svara til 1 sterlingpund. (Hetta er sami prísur sum nú gildir, og verður hann hildin fastur í hvussu er meðan prísviðurskiftini verða sum tey eru nú).

2. Av hesi útlendsku valutu, sum Landsbankin á henda hátt keypir, verður ávíst upptal — ikki undir 50 milj. kr., roknað í föroyskum krónum — sett á serstaka konto í Landsbankanum — endurnýggingarkonto. Henda valuta skal bert kunna nýtast til at endurnýggja framleiðsluútbúnað okkara. Hon skal als ikki kunna nýtast til ónyttis luksusinnflutning. Hon skal heldur ikki kunna nýtast til vanligan nýtsluvöruinnflutning, t. d. mat- og klædnavörur, tí útflutningur Föroyinga er so mikil at útlendsk valuta kortini verður til avlops til henda innflutning.

3. Framleiðsluútbúnaður landsins soleiðis sum hann er í dag, yvirhövur og í hvörjari einstakari vinnugrein fyri seg, verður gjördur upp, og síðan verður ætlað um, hvussu nógv eigur at verða flutt inn til hvörja vinnugrein fyri seg. Innflutningurin verður býttur í hesar bólkar. Aftan fyri hvönn bólk er í klombrum sett ætlaða virði í föroyskum krónum:

a. Skip, bátar, motorar og tilfar til hetta (20 milj. kr.).
b. Byggingartilfar, maskinur og annað tílíkt til fiskavinnuídnað, har í millum sildarídnað (10 milj. kr.).
c. Byggingartilfar til landbúnaðin, landbúnaðarambоð o. a. (5 milj. kr.).
d. Maskinur, amboð og byggingartilfar til ravmagnan, kola- og aðrar námur (5 milj. kr.).
e. Maskinur, amboð og byggingartilfar til annað ídnað og til handverk (5 milj. kr.).
f. Byggingartilfar til sethús (5 milj. kr.).

4. So hvört sum útflutningurin útvegar landinum störri valutuognir í útlandinum fram um tað sum fer til vanligan nýtsluvöruinnflutning, skulu ætlanir verða gjördar um, hvussu hesar ognir best verða nýttar til at útvega framleiðsluútbúnað afturat tí sum her er nevnt.

5. Tá maður ella felag vil keypa útlendska valutu av hesi valutukonto Landsbankans skal hann vísa á at valutan verður

nýtt til at keypa fyri framleiðsluútbúnað sum nevndur er undir 3 oman fyri.

6. Eru fleiri um boðið enn valuta er til skal landsstjórnin hava avgerðarrættin.

7. Landsstjórnin letur kanna eftir möguleikum til at keypa og lata byggja framleiðsluútbúnað sum nevndur er oman fyri.

8. Um so er, at hentari er at landsstjórnin einsamöll stendur fyri summum av hesum keypum (t. d. fyri at byrgja fyri at einstakir föroyskir keyparar yvirbjóða hvönn annan ella fyri at vissa betri vörugóðsku), skal hetta verða gjört. Skulu tá framleiðsluamboðini, tá tey eru fingin, endurseld einstaklingum og felögum, sum keypa vilja.

9. Lánspeningur til teirra sum ikki sjálvir kunna gjalda alt virði skal verða fingin til vega við skattum og innanlendis lánum, skyldulánum, um slíkt er neyðugt.

10. Tá slík lán verða givin til einstaklingar ella felög skal, umframt vissu um góða umsiting og rakstur, verða ansað eftir, hvörjar bygdir í landinum hava störstan törv fyri nýgerðum í vinnulívinum (fyri at byrgja fyri arbeiðsloysi í einari bygd og kannska arbeiðstroti í aðrari bygd).

11. Rentan av hesum lánum verður 2 % um árið.

Hetta er beinagrindin uttan um föroyska vinnulívið. Tá hetta er gjört — og heldur ikki fyrr — kunna vit seta í gerð skipanir og umbötur einstakum vinnuvegum og vinnugreinum til frama. Um hetta eru nógv góð uppskot komin fram. Tey finnast í blöðum, í bókum og tíðarritum og í tingtíðindum. Og tey finnast í talu manna millum út um alt landið. Tað sum her er at gera er tí ofta ikki annað enn at taka alt hetta saman og fáa bestu menn okkara úr vinnulívinum til at vísa hvörjar leiðir haldast skulu í tí og tí tilfelli. Á henda hátt vissa vit vinnulívi okkara bæði yrkiskunnleika og fólkaræði, og uttan hesar stuðlar trívist tað ikki.

**Handilsmál.** Í handilsmálum verða aðalsjónarmiðini hesi:

Föroyski uttanlandshandilin er uppá seg stórri enn í flestum öðrum londum. Kemst hetta av at framleiðslan er heldur einstáttað. Uttanlandshandilin er tí týdningarmikil táttur í búskapi landsins og velst nógv um hvussu honum vignast.

Allir duga at skilja, at tað ræður um at selja væl, men sjálvsagt velst ikki minni um at væl verður keypt inn. Tað sum er spart, er vunnið, sigur orðatakið. Meginparturin av dagligum húshaldsútreiðslum í tí föroyska heiminum fer til innfluttar útlendskar

vörur og meginparturin av teimum útreiðslum sum vinnuvegirnir — fiskivinnan, handverk, ídnaður og eisini landbúnaður — hava, fer til innflutt útlendsk amboð og til innfluttar útlendskar vörur. Í húshaldinum er virði á innfluttum útlendskum vörum valla undir 80 % og á fiskiskipi t. d. valla undir 90 %. Tað er tí avgerandi fyri vinnuvegirnar og fyri samfelagið sum heild at prísurin á innfluttum útlendskum vörum verður so lágur sum yvirhövur gjörligt.

Umframt at selja væl skal tess vegna starv okkara í uttanlandshandlinum miða í móti: 1. at keypa góðar og ódýrar vörur, 2. at minka um vöruflutningskostnaðin til landið, 3. at minka um handilskostnaðin aftan á at vöran er komin inn í landið.

**Almennar fyritökur, verk o. a.** Í öllum londum — eisini her í Föroyum — hevur tað verið so hesi seinni árini, at hin almenni táttur í búskapi landsins er vorðin störri. Landið (og kommunur) byggja vegir, havnir, lendingar, skúlar, kirkjur, sjúkrahús, ellisheim og seta á stovn almennar fyritökur. Umframt tað, at hetta hevur beinleiðis týdning fyri vinnuvegirnar (vegir, havnir o. s. fr.), so leggur hetta byggingarstarv og tær umvölingar tað förir við sær, hald á störri og störri part av tí arbeiðsmegi og framleiðsluútbúnaði, sum samfelagið hevur til at taka.

Spurningurin um hesar almennu fyritökur og almennu verk kann tí ikki verða loystur við skili fyri seg — hann er so samantvinnaður öllum búskapi og vinnulívi landsins, at hann bert kann loysast við skili, tá hann verður tikin sum lið í hesi deild.

**Sosial mál.** Föroyska fólkið og fólkið alt eigur Föroyar. Í hesum orðum liggur tann hugsan, at eingin landsmaður skal kenna seg uttan dura í hesum okkara samfelagi. Vit skulu ikki bert í orðum, heldur eisini í verki vísa, at hetta er hansara föðiland.

Í sosialum málum sigur hetta so tað, at eingin skal kenna neyð fyri dagligt breyð. Aðalsjónarmiðið má vera, at hvör hann sum starvar í hesum okkara samfelagi skal fáa rættvísan part av samfelagsinntökuni, og eisini tað, at hann sum vil, men ikki kann starva skal fáa sömiligan lut í hesi inntöku.

Hetta er ikki bert sjálvsögd menniskjanlig skylda. Slík rættvísi er eisini ein hövuðstreyt fyri, at fólkið stendur sum ein heild og ikki spjaðist og liðast sundur í fíggindaflokkar og fíggindabólkar.

**Skúla- og mentamál.** Stevnan er at skapa gróðrarlíkindi fyri föroyskum menningarlívi her á oyggjunum.

Hin föroyska menning eigur ilt við seg. Hin gamla fer so líðandi í grövina og hin unga stríðist í föðingini.

Týdningarmesti tátturin í menningar- og mentamálum er sjálvsagt skúlin.

*Barnaskúlin* eigur at geva dyggan lærdóm í landsins máli, sögu, landalæru, náttúrfröði og jarðfröði umframt annan lærdóm.

Til tess at koma á hetta mál má læraraskúlin bötast. Har umframt skulu líkindi skapast til at núverandi lærarar kunnu nema sær störri kunnleika. Hetta eru lærararnir sjálvir ivaleyst fúsastir til, og munnu teir eisini vita og duga ráðini. Tað verður helst gjört við læraraskeiðum.

*Millum- og realskúlarnir* mugu byggja á föroyskum grundarlagi.

*Studentaskúli.* Umframt máladeildina sum nú er, verður náttúrufröðideild stovnað. Eisini hesin skúli verður bygdur sum föroyskur skúli við dyggum lærdómi í föroyskum lærugreinum.

*Yrkisskúlarnir* verða hesir: sjómannsskúlin sum nú er, landbúnaðarskúli og landbúnaðarskeið, handverksskeið, handilsskúli, húshaldsskúli fyri gentur.

*Lærdur háskúli.* Vit skulu reisa okkum miðstöð fyri föroyskum menningar- og vísindastarvi. Menntamenn okkara skulu her heima í Föroyum hava líkindi til at rannsaka föroyska náttúr: jarðfröði, plantu- og djóralív á landi og í sjónum. Hetta vísindaliga starv fer sjálvsagt at tæna og verða vinnuvegum okkara at gagni. Föroyskir vísindamenn og menntamenn skulu rannsaka sögu okkara: stjórnarliga, vinnuliga, siðmenningarliga og málsliga. Á henda hátt gera vit okkara av tí vísindaliga starvi sum fer fram um allan hin mentaða heim.

Umframt hetta eigur henda miðstöð at vera skúli fyri komandi embætismenn. Tó fara vit sjálvsagt at lata nógv fólk nema sær hægri og lægri kunnleika og mentan í öðrum londum. Hetta gera öll lond — stór og smá.

Onnur mál, vit sum skjótast mugu fara undir at rökja í mentamálum okkara, eru hesi:

*Útvarpsstöð.* Umframt praktiskan týdning — við at varpa út veður- og onnur tíðindi — eigur útvarpsstöðin at vera mennandi fyri fólk okkara. Og hon kann sambinda hetta spjadda fólk og hesar spjaddu oyggjar.

*Sövn.* Bóka- og forngripasavnið í hövuðsstaðnum verður fullkomnað. Bygdasövn skulu vera í öllum hövuðsbygdum og í öllum

oyggjum.

*Bókmentir.* Skúlabökur á landsins máli verða prentaðar og útgivnar sum skjótast á kostnað landsins.

Landið eigur at stíla fyri — um ikki aðrir gera tað — at vit fáa ódýrar fólkaútgávur av sögu okkara, sagnum, kvæðum og öðrum bókmentaligum tjóðarognum.

Tað almenna eigur at stíla fyri at fólk sum farin eru úr skúla sleppa ókeypis at læra mál og sögu landsins.

Föroyar skulu sum áður nevnt hava holla samvinnu í menningarmálum við onnur Norðurlond.

**Almenn fíggjarmál.** Tað arbeiði sum gjört verður í einum samfelagi fellur í tveir hövuðstættir — hin ‚privata' og hin ‚almenna'.

Fara vit nakað aftur í tíðina, so var hin „privati" nógv störri og hin „almenni" nógv minni enn nú. Í seinni árum er hin fyrri minkaður uppá seg og hin seinni vaksin uppá seg.

Hvussu stórur partur av arbeiðinum í samfelaginum fellur undir tað privata og hvussu stórur undir tað almenna — tað avgera umstöðurnar í samfelagnum, har í millum tær politisku, so eisini treytirnar sum samfelaginum verða ásettar í millumlanda viðurskiftum, handli o. ö.

Á hesum báðum ökjum: tí privata og tí almenna eru ymiskir kraftar sum valda. Meðan fríkappingin (fríkonkuransan) — meir ella minni fullkomin — avger hvat gjört ella framleitt verður í tí privata, so eru tað beinleiðis avgerðir og samtyktir samfelagsstýrisins — tingsins og stjórnarinnar — sum siga til, hvat gjört verður á tí almenna.

Annar munur er ikki á tí privata og tí almenna starvinum. Bæði tað sum tað privata og tað almenna ger er nyttugt, er inntökuskapandi fyri samfelagið.

Tað er ikki beint at siga, at t. d. sjúkrahúsini, skúlarnir og vegirnir kosta *samfelaginum*, so og so nógv. Tað loysir seg altíð fyri samfelagið at arbeitt verður. Arbeiði kostar samfelaginum einki (um maðurin arbeiðir ella ikki arbeiðir, so skal hann liva — hava mat, klæði og hús). Og eins og tað hjá samfelaginum altíð loysir seg at fiskimaðurin fiskar, so vit fáa mat, at bóndan hevur seyð, so vit fáa ull til klæði, at smiðurin smíðar, so vit fáa hús at búgva í — soleiðis loysir tað seg altíð, at lækna sjúk fólk, so tey verða frísk og sleppa aftur til arbeiðis, at geva börnum og ungum fólki lærdóm, so tey verða betri útgjörd til at taka lut í vinnulívinum, at byggja vegir, so vinnuvegirnir fáa betri líkindi. Og sama er at siga um öll onnur störv sum tað almenna hevur tikið

á seg at útinna. (Gagnið sum vit hava av starvinum hjá tí almenna er ikki altíð sjónligt í tí dagliga lívinum. Tað er t. d. ikki beinleiðis greitt at dómarar, fúti, sýslumenn o. s. fr. eru við til at skapa inntökurnar í samfelaginum, men í royndini vita vit, at hesi størv og rættarskipan í síni heild eru alvegis neyðug fyri vinnulívið. Uttan hesa rættarskipan samfelagsins hevði yvirhövur einki skil verið á nökrum — hvörki á tí almenna ella tí privata.)

Siga vit, at vit hava ikki „ráð“ til at hava sjúkrahús, skúlar, vegir, rættarskipan o. s. fr., so kunnu vit eins væl siga, at vit hava ikki „ráð“ til at hava fiskiskap, landbúnað, handverk og aðrar vinnuvegir. Ella við öðrum orðum, at vit hava ikki „ráð“ til at liva og vera til.

Hitt er so nakað heilt annað at vit siga, at sjúkrahúsini, skúlarnir og vegirnir kosta tí almenna *kassanum* pening. Tí hetta er bert ein innanlendis bókhaldsspurningur samfelagsborgaranna millum. „Bókhaldið“ í tí privata táttinum er fríkappingin — meðan „bókhaldið“ í tí almenna táttinum eru fíggjarlógirnar sum tingið samtykkir. Í tí fyrra tilfellinum er hetta bókhald tað, at peningalepar ganga einstaklinga millum, frá Jógvani til Símun. Í tí seinna tilfellinum er bókhaldið tað, at eitt lið verður skotið inn í millum Jógvan og Símun: Tann almenni kassin. Peningaleparnir fara frá Jógvani til tann almenna kassan og haðani til Símun.

Hetta er munurin. Og fyri tann einstaka mannin kann tað aldri vera störri „byrða“ at lata endurgjald — skatt — fyri læknahjálp, lærdóm, betri samgongulíkindi o. s. fr. enn tað er „byrða“ at lata so og so nógv endurgjald — prís — fyri mat, klæði og húsrúm.

Fyri fjöldina av fólkinum hevur so hetta almenna „bókhald“ stóran fyrimun fram um tað privata. Meðan stórinntökumaðurin og smáinntökumaðurin lata sama endurgjald — prís — fyri ta vöru ella ta nyttu, sum teir keypa hjá tí privata, so lata teir ikki sama endurgjald — skatt — fyri ta „vöru“ ella nyttu sum teir fáa frá tí almenna. Fara smáinntökumaðurin og stórinntökumaðurin til handils, so verður ikki spurt um, hvussu stórar inntökur teir hava, hvussu nógv teir eru mentir at gjalda — og prísurin roknaður eftir tí. Báðir mugu geva sama prís fyri somu vöru. So er ikki hjá tí almenna. Har verður goldið eftir inntökuni, eftir hvat hvör er mentur. Fyri somu nyttu av læknahjálp, lærdómi, vegum o. s. fr. letur stórinntökumaðurin nógv störri endurgjald — skatt — enn smáinntökumaðurin.

Uppgávan hjá hesum almenna bókhaldi er tí ikki bert at stíla fyri einum vissum parti av arbeiðinum í samfelagnum, heldur eisini at *javna* livikorini hjá fólkinum.

Her niðan fyri er sett uppskot um hetta almenna bókhald komandi ár — fíggjarlógaruppskot fyri árið 1947. Víst verður á hana og tær viðmerkingar og frágreiðingar, har eru prentaðar.

# Fíggjarlógaruppskot

fyri árið 1947.

## I. DEILD

*Inntökur:*

*1. §. Skattur, tollur og onnur almenn gjöld.*

| | | kr. | kr. |
|---|---|---|---|
| 1. | Inntökuskattur | 3.460.000 | |
| 2. | Innflutningstollur | 2.360.000 | |
| 3. | Millumkommunalur skattur | 100.000 | |
| 4. | Skemtanarskattur | 75.000 | |
| 5. | Arva- og gávugjald | 30.000 | |
| 6. | Stempulgjald | 100.000 | |
| 7. | Bilskattur | 50.000 | |
| 8. | Rættargjöld o. a. (gebyr) | 100.000 | |
| 9. | Skipagjald (á útlendskum skipum) | 100.000 | |
| 10. | Bötur og tilíkt | 25.000 | |
| | | | 6.400.000 |

*2. §. Almennar fyritökur.*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Ríkisprentsmiðja | 0 | |
| 2. | Ríkisapotekið | 0 | |
| 3. | Tubbaks- og rúsdrekkasöla | 500.000 | |
| | | | 500.000 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| *3. §.* | *Inntökur av virðisbrövum, bankainnistöðum, partabrövum o. ö.* | 50.000 | |
| | | | 50.000 |
| | | | 6.950.000 |

# II. DEILD

*Útreiðslur:*

4. §. *Hægsta stjórn landsins:*

| | kr. | kr. |
|---|---|---|
| 1. Forsetalön | 20.000 | |
| 2. Representatión | 10.000 | |
| 3. Forsetaritari | 8.000 | |
| 4. Skrivstovukostnaður | 10.000 | |
| | | 48.000 |

5. §. *Løgtingið:*

| | | |
|---|---|---|
| 1. Tingmannalön | 70.000 | |
| 2. Løgtingsskrivstova | 15.000 | |
| 3. Løgtingshúsið | 7.000 | |
| 4. Prenting o. a. | 30.000 | |
| | | 122.000 |

6. §. *Stjórnarráðið:*

| | | |
|---|---|---|
| 1. Ríkisstjórnin: | | |
| a. Ráðharralön | 36.000 | |
| b. Representatión | 15.000 | |
| c. Starvsmannalön (2 skrivstovustjórar 2 fulltrúar, annað starvsfólk) | 60.000 | |
| d. Annar kostnaður | 30.000 | |
| 2. Ríkisbókhald, skattstova, tollstova: | | |
| a. Forstjóralön | 12.000 | |
| b. Fulltrúalönir (2 fulltrúar) | 16.000 | |
| c. Annað starvsfólk | 36.000 | |
| d. Annar kostnaður | 20.000 | |
| 3. Skattaráðið (líkningarnevnd) | 35.000 | |
| 4. Grannskoðan ríkisroknskapsins og banka- og sparikassaeftirlit: | | |
| a. Forstjóralön | 12.000 | |
| b. Fulltrúalön | 8.000 | |
| c. Starvsmannalön | 6.000 | |
| d. Annar kostnaður | 10.000 | |
| 5. Uttanríkismál: | | |
| a. Sendiharralönir | 36.000 | |
| b. Representatión | 20.000 | |
| At flyta | 352.000 | 170.000 |

| | kr. | kr. |
|---|---|---|
| Flutt........ | 352.000 | 170.000 |
| c. Ferðakostnaður, skrivstovukostnaður o. a. ........................................................ | 50.000 | |
| | | 402.000 |
| 7. §. *Lögreglumál:* | | |
| 1. Lögregluskrivstovan: | | |
| a. Lögreglustjóralön .................................... | 12.000 | |
| b. Fulltrúi ...................................................... | 8.000 | |
| c. Aðrar lönir............................................... | 20.000 | |
| d. Annar kostnaður ...................................... | 10.000 | |
| 2. Sýslumannsskrivstovur: | | |
| a. Sýslumannslönir (og sóknarfulltrúa-)..... | 60.000 | |
| b. 5 sýslumannsfulltrúar.............................. | 30.000 | |
| c. Aðrar lönir............................................... | 6.000 | |
| d. Annar kostnaður....................................... | 25.000 | |
| 3. Lögreglu- og tolleftirlitsmenn ................... | 25.000 | |
| 4. Sjóverjan ...................................................... | 100.000 | |
| 5. Fangahús: | | |
| a. Lönir ......................................................... | 15.000 | |
| b. Annar kostnaður....................................... | 15.000 | |
| 6. Alment eftirlitsstarv: | | |
| a. Skipasýn ................................................... | 25.000 | |
| b. Ravmagnseftirlit ...................................... | 3.000 | |
| c. Verksmiðju- og maskineftirlit................. | 2.000 | |
| d. Príseftirlit ................................................. | 20.000 | |
| | | 376.000 |
| 8. §. *Dómsmál:* | | |
| 1. Hægri rættur: | | |
| a. Lön dómara.............................................. | 45.000 | |
| b. Lön fulltrúa.............................................. | 8.000 | |
| c. Onnur starvsmannalön............................. | 5.000 | |
| d. Annar kostnaður....................................... | 5.000 | |
| 2. Lægri rættur: | | |
| a. Lön dómara............................................... | 12.000 | |
| b. Lön fulltrúa ............................................. | 8.000 | |
| c. Onnur starvsmannalön ............................ | 25.000 | |
| d. Annar kostnaður....................................... | 10.000 | |
| | | 118.000 |
| At flyta........ | | 1.066.000 |

| | kr. | kr. |
|---|---|---|
| Flutt........ | | 1.066.000 |
| 9. §. *Lækna- og heilsumál:* | | |
| 1. Sjúkrahús: | | |
| a. Landssjúkrahúsið | 481.000 | |
| b. Klakksvíkar sjúkrahús | 221.000 | |
| c. Tvöroyrar sjúkrahús | 50.000 | |
| d. Bróstsjúkrahúsið | 191.000 | |
| e. Sjúkrahúsið í Sandavági | 50.000 | |
| f. Sinnissjúkrahús | 100.000 | |
| 2. Embætislæknar: | | |
| a. Lön til landslækna | 12.000 | |
| b. Fylkislæknar | 24.000 | |
| c. Kommunulæknar | 24.000 | |
| 3. Ljósmöður | 30.000 | |
| 4. Annar kostnaður | 20.000 | |
| | | 1.203.000 |
| 10. §. *Samgongumál:* | | |
| 1. Vega-, havna-, ravmagns- og vitastjórn: | | |
| a. Aðalstjórn: | | |
| Aðalverkfrøðingur | 12.000 | |
| 4 verkfrøðingar | 40.000 | |
| Skrivstovukostnaður | 10.000 | |
| Ferða- og annar kostnaður | 10.000 | |
| b. Nýbyggingar og umvölingar á samgonguverkinum: | | |
| Vegir, berggongdir | 400.000 | |
| Havnir, brýr, lendingar | 600.000 | |
| Vitar, tokulúðrar og onnur siglingarmerki og lön til starvsfólk | 110.000 | |
| 2. Postverkið | 0 | |
| 3. Telefonverkið | 0 | |
| 4. Sigling innan oyggja (Smiril) | 100.000 | |
| 5. Útvarp og veðurstova | 100.000 | |
| | | 1.382.000 |
| 11. §. *Skúla- og mentamál:* | | |
| 1. Barnasulin: | | |
| a. Læraralönir | 683.000 | |
| b. Studningur til nýggjar skúlabyggingar | 50.000 | |
| At flyta........ | 733.000 | 3.651.000 |

| | | kr. | kr. |
|---|---|---|---|
| | Flutt........ | 733.000 | 3.651.000 |
| | 2. Læraraskúlin: | | |
| | a. Læraralönir | 15.000 | |
| | b. Bökur o. a. | 5.000 | |
| | c. Næmingastudningur | 10.000 | |
| | 3. Millum- og realskúlar: | | |
| | a. Læraralönir | 180.000 | |
| | b. Bökur o. a. | 20.000 | |
| | c. Næmingastudningur | 20.000 | |
| | 4. Studenta- og preliminærskúli: | | |
| | a. Kennaralönir | 80.000 | |
| | b. Bökur o. a. | 10.000 | |
| | c. Næmingastudningur | 30.000 | |
| | 5. Lærdur háskúli | 50.000 | |
| | 6. Ferða- og námsstudningur til næmingar uttanlendis | 35.000 | |
| | 7. Bóka- og skjalasövn | 50.000 | |
| | 8. Forngripa- og listasavn | 25.000 | |
| | 9. Föroya fólkaháskúli | 10.000 | |
| | 10. Ymiskur studningur til menningar- og menntamál: | | |
| | a. Rithövundar og skald | 10.000 | |
| | b. Útgrefstur, staðarnavnakannan | 10.000 | |
| | c. Útgávu- og prentingarstudningur | 10.000 | |
| | d. Ítróttur og fimleikur | 50.000 | |
| | | | 1.353.000 |
| 12. §. | *Kirkjumál:* | | |
| | 1. Bispur: | | |
| | a. Lön | 12.000 | |
| | b. Annar kostnaður | 8.000 | |
| | 2. Prestar: | | |
| | a. Lön | 135.000 | |
| | b. Annar kostnaður | 10.000 | |
| | 3. Annar kostnaður av kirkjumálum | 35.000 | |
| | | | 200.000 |
| 13. §. | *Vinnu- og handilsmál:* | | |
| | 1. Landbúnaður: | | |
| | a. Royndarstöðin | 36.000 | |
| | At flyta........ | 36.000 | 5.204.000 |

| | | | kr. | kr. |
|---|---|---|---|---|
| | | Flutt........ | 36.000 | 5.204.000 |
| | | b. Uppdyrkingar-, amboðs og bygg-ingarstudningur | 50.000 | |
| | | c. Útskifting | 50.000 | |
| | | d. Landbúnaðarráðgevi, seyðaráðgevi | 11.000 | |
| | | e. Djóralækni | 12.000 | |
| | | f. Seyðaalistöð | 10.000 | |
| | | g. Búnaðarfelagið | 25.000 | |
| | | h. Landbúnaðarskúli og landbúnaðar-skeið | 50.000 | |
| | 2. | Handverk og ídnaður | 10.000 | |
| | 3. | Fiskivinna: | | |
| | | a. Fiskimálaráð | 10.000 | |
| | | b. Sjómannsskúlin: | | |
| | | Læraralönir | 50.000 | |
| | | Bökur o. a. | 10.000 | |
| | | Næmingastudningur | 10.000 | |
| | 4. | Handilsskúli | 10.000 | |
| | 5. | Húshaldsskúli | 10.000 | |
| | | | | 354.000 |
| 14. §. | | *Sosial mál:* | | |
| | 1. | Ellisstyrkur | 700.000 | |
| | 2. | Styrkur til einkjubörn | 40.000 | |
| | 3. | Sosialstyrkur | 115.000 | |
| | 4. | Studningur til sjúkrakassar | 80.000 | |
| | 5. | Avlamisstudningur | 70.000 | |
| | 6. | Óarbeiðsförir fiskimenn | 20.000 | |
| | 7. | Serstudningur | 14.000 | |
| | 8. | Ellisheim, hvíldarheim | 40.000 | |
| | | | | 1.079.000 |
| 15. §. | | *Ymiskar eftirlönir og studningur* | 35.000 | |
| | | | | 35.000 |
| 16. §. | | *At hava til at taka* | 278.000 | |
| | | | | 278.000 |
| | | | | 6.950.000 |

# Frágreiðingar og viðmerkingar.

## I. DEILD

### *Inntökur:*

1. §. *Skattur, tollur og onnur almenn gjöld.*

*1. liður.* Hetta tal sum her er sett upp fyri inntökuskatt er sama tal sum fyri árið 1945 (smb. Lögtingstíðindi). — Sum nú er verða nógvar skattskyldugar inntökur ikki givnar upp til skatt. Við at útbyggja eftiransingina við skattauppgávuni og gera hana strangari og haldbetri kann nógv meir fáast inn í skatti — ivaleyst fleiri hundrað túsund krónur. Tað verður tá eisini gjörligt at gera allar smáar inntökur — í minsta lagi allar inntökur undir 2.500 kr. — heilt skattafríar.

*2. liður.* Seinasta hálva ár komu inn í tolli 1,4 milj. kr., so hetta tal, sum her er fyri eitt heilt ár, er lágt sett. — Annars verður tollur á ónyttis luksusvörum hækkaður.

*3. liður.* Við hesum skatti verður skatturin í kommunum við ójavnum skatti javnaður.

*4. liður.* Skatturin verður hækkaður eitt lítið sindur.

*5. liður.* Við at hækka skattastigini uppí tað sum gildir t. d. í Danmörk eigur arva- og gávugjaldið at geva um leið hetta tal (smb. Lögtingstíðindi 1944, skjal nr. 8, bls. 17).

*6. liður.* Við at hækka skattastigini uppí tað sum gildir t. d. í Danmörk eigur stempulgjaldið at geva um leið hetta tal (smb. Lögtingstíðindi 1944, skjal 8, bls. 14).

*7. liður.* Skatturin nakað sum nú (smb. Lögtingstíðindi). Eigur tó at fara at geva nógv meir, nú bilarnir verða fleiri.

*8. liður.* Við at hækka gjöldini upp í tað sum gildir t. d. í Danmörk eiga hesi gjöld at geva um leið hetta tal (smb. Lögtingstíðindi 1944, Lögtingstíðindi 1944,).

*9. liður.* Umframt eitt ógvuliga lágt havnargjald, sum fer í havnarkassarnar, hava fremmand skip bert goldið lestagjald. Hetta lestagjald er so lágt, — 5 oyru pr. ton — og verður verri enn so altíð kravt upp eftir lógini, at tað lítla og onga inntöku hevur givið. Vit at hækka gjaldið uppí nakað tað sama sum gildir í Bretlandi — har tað er væl minni enn í Íslandi — eigur skipagjaldið á útlendskum skipum at geva í hvussu er hetta tal, sum her er sett.

*10. liður.* Talið er lágt sett.

2. §. *Almennar fyritökur.*

Hetta eru fyritökur, sum landið hevur (aðrar fyritökur hjá tí almenna, sjá undir samgongumálum).

*1. liður.* Ríkisprentsmiðjan prentar fyrst og fremst fyri tað almenna. Allar almennar fyritökur eiga tó at gjalda fyri tað sum fyri tær verður gjört. Umframt hetta tekur so prentsmiðjan á seg vanligt prentstarv. Her verður annars eingin vinningur settur, tó prentsmiðjan ivaleyst fer at geva yvirskot.

*2. liður.* Tað almenna yvirtekur apotekaraverkið við tí endamáli at lækka medisinprísirnar. Her verður tí eingin vinningur settur upp.

*3. liður.* Fyri at minka um misbrúkið av rúsdrekka má sölan koma undir landseinsölu. Tann handilságóði, ið nú verður lagdur uttanlands, kemur so eisini landinum til góðar. — Undir hesi stovnan verður so eisini tubbaksvöruinnflutningurin lagdur. Smásöla við tubbaksvörum verður tó frí sum higar til.

3. §. *Inntökur av virðisbrövum, bankainnistöðum, partabrövum o. ö.*
Talið er nakað sum nú.

# II. DEILD

## *Útreiðslur:*

Útreiðslurnar eru yvirhövur allar högt tilætlaðar — ivaleyst nógv hægri enn neyðugt er. — Viðvíkjandi embætismannalönum er hetta at siga: Ein av uppgávunum hjá fyrstu stjórn landsins er at gera uppskot um almenna lönalóg at leggja fyri tingið. Í hesi lóg verða reglur fyri lönir í teim ymsu starvsgreinum og so reglur um grundlön, staðar-, ellis- og dýrtíðarviðbót, eftirlön o. s. fr. Hagar til hetta er gjört galda hesi lönastig:

| | |
|---|---|
| 20.000 kr. árliga: | forseti landsins. |
| 15.000 kr. árliga: | hægrirættardómarar. |
| 12.000 kr. árliga: | lægrirættardómari, ráðharrar, skrivstovustjórar í stjórnarráðnum, forstjórar, bispur, sendiharrar í öðrum londum, landslækni. |
| 8.000 kr. árliga: | fulltrúar í stjórnarráðnum, sýslumenn. |

Lönin hjá skúlalærarum verður hækkað við 15 %.

4. §. *Hægsta stjórn landsins.*
Lön, sjá oman fyri.

5. §. *Lögtingið.*
*1. og 3. liður.* Útreiðslurnar verða nakað sum nú.
*2. liður.* Útreiðslurnar verða minni enn nú við tað at meginparturin av starvi lögtingsskrivstovunnar verður lagt undir aðrar stovnanir og skrivstovur.
*4. liður.* Útreiðslurnar eru settar væl hægri enn nú.

6. §. *Stjórnarráðið.*
*1. liður.* Ráðharrar 3 í tali, skrivstovustjórar 2 og fulltrúar 2. Har umframt annað skrivstovufólk.
*2. liður.* Henda deild svarar til gjaldstovuna sum nú er. Har verða allar almennar innlögur (skattur, tollur o. s. fr.) goldnar inn og allar almennar útreiðslur (lönir o. s. fr.) útreiddar. Har verður ríkisbókhaldið. Fyri hesi deild verður forstjóri. So verða 2 fulltrúar og annað skrivstovufólk. Kostnaður nakað væl hægri enn nú.
*3. liður.* Henda deild svarar til núverandi líkningarráð.

*4. liður.* Serstök skrivstova. Har verður ríkisbókhaldið grannskoðað. Har verður eisini grannskoðan av og eftirlit við banka- og sparikassaverki, öllum almennum roknskapum, grunnum o. s. fr. Fyri hesi skrivstovu er 1 forstjóri. So er ein fulltrúi og har umframt skrivstovufólk.

*5. liður.* Sendiharraembætini verða hesi:
1 í Bretlandi,
1 fyri Norðurlond og onnur lond í Evropu,
1 fyri londini í Ameriku.
Umframt hetta verða konsular í ymiskum londum (hesir eru ólöntir og kosta einki).

7. §. *Lögreglumál.*
*1. liður.* Útreiðslurnar verða nakað tær somu sum nú.
*2. liður.* Útreiðslurnar nakað tær somu sum nú, tó lönbötur.
*3. liður.* Útreiðslurnar verða nakað tær somu sum nú. Lögreglumenn eru samtíðis tolleftirlitsmenn.
*4. liður.* Útreiðslurnar verða í hvussu er ikki hægri enn hetta tal.
*5. og 6. liður.* Útreiðslurnar verða settar hægri enn nú.

8. §. *Dómsmál.*
*1. liður.* Dómarar í hægri rætti verða 3 í tali.
*2. liður.* Í lægri rætti 1 dómari sum nú. Útreiðslurnar verða eitt sindur hægri enn nú.

9. §. *Lækna- og heilsumál.*
*1. Liður.* Útreiðslurnar til Landssjúkrahúsið, sjúkrahúsini í Klakksvík og á Tvöroyri og til Bróstsjúkrahúsið nakað sum nú. Útreiðslurnar til sjúkrahúsið í Sandavági og til sinnissjúkrahús ætlaðar.
*2. og 3. liður.* Útreiðslurnar nakað sum nú.

10. §. *Samgongumál.*
*1. liður.* Undir hesi stovnan (verkfröðingsskrivstovu lögtingsins sum nú er) verða öll vega-, havna-, ravmagns- og vitamál lögd. — Viðvíkjandi nýbygningum og umvölingum er hetta at siga: Tá ein vegur, havn, lending o. s. fr. longu er gjörd, eigur ikki at vera spart at halda hetta í góðum standi. Hvussu nógv eigur at vera gjört av *nýggjum vegum, havnum, lendingum o. s. fr.* til hvörja tíð, lagar seg fyrst eftir törvum vinnulívsins og síðan eftir líkindum hjá fólki til annað arbeiði.
*2. liður.* Postgjöldini eru ikki ella bert lítið hækkað í dýrtíðini. Verða gjöldini hækkað nakað kemur postverkið at hvíla í sær sjálvum.
*3. liður.* Hvílir í sær sjálvum.
*4. liður.* Útreiðslurnar tær somu sum nú. Við betri skipan eigur siglingin innan oyggja at koma at hvíla í sær sjálvum.
*5. liður.* Til at fara undir at byggja útvarp við veður- og öðrum tíðindum og seinni öðrum útsendingum verður hetta tal sett.

11. §. *Skúla- og mentamál.*
Læraralönirnar verða sum áður nevnt hækkaðar við 15 % yvirhövur.
*1.—4. liður.* Hesar skúlar hava vit nú, og útreiðslurnar — lönir frátiknar — verða nakað tær somu sum nú. Studentaskúlin fær tó náttúrfröðideild afturat máladeildini sum nú er.
*5. liður.* Til lærda háskúlan verður fyri fyrsta árið sett hetta tal. Bæði

nú fyrsta árið og seinni fara menn sum sita í öðrum embætum (dómarar, bispur og prestar, læknar, verkfröðingar) at hava skyldu til at hava lærarastarv á háskúlanum fyri lága samsýning.
*6. liður.* Saman við lærda háskúlanum her heima eigur hesin studningur at vissa okkum nóg mikið av fólki við hægri menntan og lærdómi.
*7.—9. liður.* Væl tilætlað — hægri enn nú.
*10. liður.* Hesir studningar hava higartil yvirhövur verið ov lágir, og verða tí flestir hækkaðir nógv. Til hetta endamál verða annars eisini peningur nú veittur úr menntunargrunninum sum stovnaður varð 6. mei í ár.

12. §. *Kirkjumál.*
Einasta broyting her er at bispaembætið kemur í staðin fyri próstaembætið sum nú fellur burtur.

13. §. *Vinnu- og handilsmál.*
Hövuðsstuðul vinnulívsins er ikki beinleiðis peningaligur studningur frá tí almenna, heldur betri skipan yvirhövur sum tað almenna setur tí, smb. framman fyri.
*1. liður.* Til dyrkingar-, amboðs- og byggingarstudning verða settar 50.000 kr., til útskifting 50. 000 og til komandi landbúnaðarskúla og búnaðarskeið verða 50.000 kr. settar.
*2. liður.* Studningur til handverksskeið.
*3. liður.* Fiskimálaráðið er nýggj stovnan: eigur at vera ráðgevandi hjá landsstórnini í fiskivinnumálum. — Útreiðslurnar til sjómannskúlan nakað tær somu sum nú.
*4. liður.* Studningur til handilsskúla.
*5. liður.* Studningur til komandi húshaldsskúla.

14. §. *Sosial mál.*
Hagar til broytingar verða gjördar í sosiallóggávuni og sosialverk landsins er vorðið tíðarhóskandi verða studningarnir yvirhövur hækkaðir 15 %.

15. §. *Ymiskar eftirlönir og studningur.*
Hesar útreiðslur eru settar eitt sindur hægri enn nú er.

16. §. *At hava til at taka.*
Skuldu inntökurnar verið ov högt settar og útreiðslurnar ov lágt settar, sum tó ikki er trúligt, samanber oman fyri, eru her 278.000 kr. til at taka.

# Fíggjarlógaruppskotið fyri árið 1947.

Samandrigið.

## I. DEILD

*Inntökur:*

| | | |
|---|---|---|
| 1. §. | Skattur, tollur og onnur almenn gjöld | 6.400.000 |
| 2. §. | Vinningur av rakstri ríkisstovnanna | 500.000 |
| 3. §. | Inntöka av virðisbrövum o. ö | 50.000 |
| | | 6.950.000 |

## II. DEILD

*Útreiðslur:*

| | | |
|---|---|---|
| 4. §. | Hægsta stjórn landsins | 48.000 |
| 5. §. | Lögtingið | 122.000 |
| 6. §. | Stjórnarráðið | 402.000 |
| 7. §. | Lögreglumál | 376.000 |
| 8. §. | Dómsmál | 118.000 |
| 9. §. | Lækna- og heilsumál | 1.203.000 |
| 10. §. | Samgongumál | 1.382.000 |
| 11. §. | Skúla- og mentamál | 1.353.000 |
| 12. §. | Kirkjumál | 200.000 |
| 13. §. | Vinnumál | 354.000 |
| 14. §. | Sosial mál | 1.079.000 |
| 15. §. | Ymiskar eftirlönir og studningar | 35.000 |
| 16. §. | Til at taka | 278.000 |
| | | 6.950.000 |

# Stórnarskrá Föroya.

1. §.

Föroyar eru tjóðveldi.

2. §.

Lóggávuvaldið er hjá lögtingi og forseta Föroya. Gerðavaldið er hjá forsetanum. Dómsvaldið er hjá dómstólunum.

3. §.

Setið hjá stjórnarvöldunum er í Tórshavn.

4. §.

Forseti Föroya verður kosin av Föroya fólki fyri 5 ár.

5. §.

Valbærur til forseta er hvör 35 ára gamal föroyingur, sum uppfyllir treytir tær, ið settar eru fyri valrætti til lögtingið, bústaðartreytin frátikin.

6. §.

Hvörjir 400 lögtingsvalbærir föroyingar, minst 25 úr hvörji sýslu og minst 25 úr Tórshavn kunnu skjóta upp evni til forseta. Eru fleiri forsetaevni í boði, fer forsetaval fram, aðramáta er tann, ið uppskotin var, kosin forseti. Forsetaval fer fram við beinleiðis og loyniligan valhátt. Lögtingsveljarar eru forsetaveljarar.

7. §.

Forsetin tekur við forsetastarvinum ólavsökudag og letur tað frá sær ólavsökuaftan, táið 5 ár eru liðin, uttan so at hann er afturvaldur. Forsetaevni skulu skjótast upp í júni mánaði tað árið ið forsetin skal fara frá, og forsetaval fer fram í júli mánaði sama árið.

8. §.

Doyr forseti skal, um minst tveir mánaðir eru til ólavsöku, annar veljast sama árið, aðramáta árið eftir.

9. §.

Táið forsetaembætið er leyst, ella forsetanum berst frá, eiga forsætisráðharrin, lögmaðurin og lögtingsformaðurin forsetavald. Verða teir ymiskir á máli ræður meirilutin. Lögtingsformaðurin stýrir fundum teirra.

10. §.

Lön forsetans og teirra ið sita við forsetavaldið verður at áseta við

lóg. Forsetin má ikki hava annað lönt starv í hondum. Hann má ikki vera lögtingsmaður.

11. §.

Áður enn forsetin tekur við valdi, ger hann trygdareið ella heitstreingi at halda stjórnarskránna. Eiðin ella heitstreingið verður at festa á blað í tveimum eintökum sum lögtingið og landsbókasavnið fáa hvört sítt at goyma.

12. §.

Forsetin ella teir ið sita við forsetavaldið hava ikki ábyrgd av landastýrinum.

Forsetin verður ikki saksöktur í brotsmálum uttan lögtingið so samtykkir.

Forsetin fer av, um tað verður samtykt við meiriluta á fólkaatkvöðu, sum skal haldast táið ¾ av lögtingslimunum kevja tað. Slík fólkaatkvöða skal fara fram innan tveir mánaðir aftaná at lögtingið hevur samtykt at krevja hana, og frá tí at henda samtykt er gjörd til úrslitið av fólkaatkvöðuni er kunnugt, at forsetin loystur úr starvi sínum. Ynskir meirilutin av fólkinum, at forsetin skal verða sitandi, fer lögtingið av, og nýtt lögtingsval fer fram.

13. §.

Vald forsetans skulu ráðharrar útinna.

14. §.

Ráðharrarnir hava ábyrgd av öllum stjórnargerðum. Embætisábyrgd teirra verður tilskilað við lóg. Lögtingið ella forsetin kunnu klaga ráðharrarnar fyri teirra embætisrökt. Landsrætturin dömir hesi sakarmál.

15. §.

Lögrætturin og tríggir eykadómarar, sum lögtingið velur, er landsrættur. Lögmaðurin hevur forsæti og úrslitsatkvöðuna.

16. §.

Forsetin setur ráðharrar í og úr embæti. Fyrsti ráðharri er nevndur forsætisráðharri. Hann stýrir ráðharrafundum.

17. §.

Lógir og týdningarmiklar stjórnargerðir skulu ráðgerast í landsráði, har allir ráðharrar hava sæti og forsetin hevur forsæti. Forsetin og hvör einstakur ráðharri, kann kalla landsráðið saman.

Berst forsetanum frá, kann hann lata málið viðgera á ráðharrafundi. Í landsráði og á ráðharrafundi hevur forsætisráðharrin úrslitsatkvöðuna, táið ráðharrarnir eru yniskir á máli. Av ráðagerðum á landsráði og á ráðharrafundi verður so mikið at festa í bók, at fundarúrslit og stöðan hjá hvörjum ráðharra eru til skjals. Áðrenn fundur er lokin skal hvör ráðharri skriva undir í gerðabókina.

Táið ráðharrafundur hevur verið, ræður forsetin fyri, um málið skal viðgerast í landsráðnum.

18. §.

Táið forsetin og ráðharri við honum hava skrivað undir lóg ella stjórnargerð hava tey gildi.

19. §.

Forsetin skipar menn í embæti sambært lógum. Eingin má uttan við serligari lógheimild skipast í embæti sum ikki er föroyskur landsborgari.

Embætismenn skulu gera eið ella heiti at halda stjórnarskránna.

Forsetin kann seta teir embætismenn úr embæti sum hann hevur sett í embæti. Eftirlön teirra verður ásett eftir lógini.

Forsetin kann flyta embætismenn úr einum embæti í annað, tó mugu teir einki lissa av embætisinnlögum sínum við flytingina, og teir sleppa at velja, um teir vilja flytast ella fara frá við eftirlön eftir lógini.

20. §.

Forseti Föroya kann ikki uttan lögtingsins samtykki gera sáttmálar við onnur lond, táið teir víkja at ríkisrættarligu stöðu landsins ella nema við vald Föroya yvir nökrum parti av oyggjunum og viðvíkjandi sjómarkinum.

21. §.

Forsetin stevnir lögtinginum saman hvört ár og ger av nær tað skal slítast. Ting má ikki slítast fyrr enn fíggjarlóg er samtykt. Forsetin kallar lögtingið til eykatingsetu, táið törvur er á.

22. §.

Forsetin kann steðga fundunum hjá regluligum lögtingi eitt ávíst tíðarskeið, tó bert einaferð somu setuna og ikki meir enn tvær vikur uttan tingið samtykkir.

23. §.

Forsetin kann loysa upp løgtingið, men tó skal nýtt veljast áðrenn 2 mánaðir eru gingnir, og síðan koma saman ikki seinni enn á ólavsøku.

24. §.

Forsetin kann leggja uppskot til lógir og aðrar samtyktir fyri løgtingið.

25. §.

Táið løgtingið hevur samtykt lóguppskot, skal tað leggjast fyri forsetan til at staðfesta ikki seinni enn tvær vikur eftir at tað var samtykt, og staðfestingin gevur tí lóggildi. Sýtir forsetin at staðfesta lóguppskotið, skal tað sum skjótast, og ikki seinni enn 2 mánaðir frá tí, at forsetin fekk tað til staðfestingar, leggjast undir fólkaatkvøðu. Fær uppskotið meiriluta við fólkaatkvøðu, er tað lóg.

26. §.

Forsetin kunnger lógir og setir tær í verk.

27. §.

Forsetin eigur vald í neyðbráð at geva bráðfeingislóg, táið tingið ikki er saman. Ikki má lógin vera ímóti stjórnarskránni; hon skal leggjast fyri fyrsta løgting. Verður hon ikki samtykt gongur hon úr gildi. — Fíggjarlóg má ikki vera bráðfeingislóg.

28. §.

Forsetin kann náða brotsmenn. Ráðharrar kann hann tó ikki loysa frá saksókn fyri landsrætti ella landsrættardómi uttan løgtingið samtykkir.

29. §.

Forsetin loyvir ella letur onnur stjórnarvøld loyva undantøk frá lógum eftir reglum teim, ið higartil hava verið fylgdar.

30. §.

Peningaviðurskifti verða at skipað við lóg.

31. §.

Á løgtingi eiga í minsta lagi tjúgu í mesta lagi tríati fólkavaldir tingmenn sæti, valdir við loyniligum vali. Samstundis sum tingmenninir verða valdir, verða eins nógvir varamenn valdir.

Av løgtingsins tingmannatali verða 20 tinglimir valdir í valdømum. Harumframt verða í mesta lagi 10 eykatingmenn valdir til

tess at javna millum tingflokkanna, so at tingmannatalið hjá hvörjum flokki sum best samsvarar atkvöðunögd flokksins við lögtingsvalið.

Tinglimirnir verða valdir fyri 4 ár.

Vallógin ásetur gjöllari lögtingsvalskipan.

32. §.

Valrætt á lögtingsvali eiga allir fast búsettir föroyskir landsborgarar ið fylt hava 21 ár táið val fer fram og ikki eru gjördir ómyndingar, ikki hava notið slíka fátækrahjálp frá tí almenna og *ikki* hava lotið tílíkan æruminkandi dóm, at valrætturin, táið val fer fram, er týndur.

Vallógin ásetur gjöllari reglur um valrættin.

33. §.

Valbærur til lögtingið er hvör tann, sum valrætt eigur á lögtingsvali.

34. §.

Regluligt lögting skal koma saman hvört ár ólavsökudag ella næsta gerandisdag.

35. §.

Lögtingið er friðlýst. Tann sum nervar tess trygd og frælsi er sekur fyri landasvik.

36. §.

Tað er lögtinginum heimilt at skipa nevndir av tingmonnum til at kanna týðandi mál sum almenningi umvarðar. Slík nevnd hevur rætt til at krevja munnligar og skrivligar frágreiðingar bæði frá embætismonnum og öðrum borgarum.

37. §.

Skattur má eingin áleggjast, broytast ella avtakast uttan við lóg.

Lán má ikki takast, sum skuldbindur tjóðveldið, ei heldur jörð landsins og lunnindi seljast ella veðsetast uttan við lógarheimild.

38. §.

Fyri hvört regluligt lögting, fyrsta tað er saman komið, skal stjórnin leggja fram fíggjarætlan fyri komandi árið. Uttan heimild í fíggjarlóg má stjórnin eingi útgjöld rinda.

39. §.

Lögtingið velur 2 landsroknskapargrannskoðarar við lön. Teir skulu ansa eftir at allar landsins innlögur eru taldar og at heimild

er í fíggjarlóg til allar útlögur. Teimum er loyvt at krevja tær frágreiðingar og tey skjöl frá stjórnarvöldunum sum törvast. Landsroknskapur fyri árið verður síðan við viðmerkingum grannskoðaranna at leggja fyri lögtingið. Ger tingið tá samtykt um roknskapin.

Henda grein kann broytast við lóg.

40. §.

Lóg verður ikki samtykt á lögtingi, fyrr enn tríggjar ferðir er viðgjörd.

41. §.

Lögtingið ger sjálvt av, um tingmenninir eru lógliga valdir, sama um tingmaður hevur mist sína valheimild.

42. §.

Hvör tingmaður skal, táið val hans er góðkent, hátíðarliga játta at halda stjórnarskránna.

43. §.

Lögtingsmenn eru bert bundnir við sannföring sína og við ongar veljara treytir.

Embætismonnum törvar ikki samtykki frá stjórnini til tess at taka við lögtingsvali, men embætisstarvið skal av teirra ávum rökjast eftir stjórnarinnar tykki uttan útlögu hjá tí almenna.

44. §.

Meðan lögtingið er saman má ikki havast upp brotsmál móti nökrum tingmanni, ei heldur má hann setast fastur ella í varðhald uttan tingið samtykkir — ella hann í brotsgerð síni verður tikin á hondum. — Fyri tað tingmaður innan tings hevur sagt, stendur hann ikki uttan tings til svars, uttan tingið samtykkir.

45. §.

Týnist tingmannsins valbæri, týnist rætturin við, ið tingvalið gav honum.

46. §.

Ráðharrarnir eiga vegna embætisstöðu sína sæti á lögtingi; teir taka til orða táið teir vilja, men verða tó at halda tingsins skipan. Atkvöðurætt hava teir ikki, uttan teir eisini eru lögtingsmenn.

47. §.

Lögtingið velur sær sjálvt formann.

48. §.

Tingið fær einki mál samtykt uttan meira enn helvtin av tingmonnunum er á fundi og greiðir atkvöðu.

49. §.

Á tingi er við samtykki tingsins, hvörjum tingmanni loyvt at bera uppá mál hvönn almennan spurning og krevja at ráðharrunum frágreiðing um málið.

50. §.

Tingmál má ikki takast til viðgerðar uttan tingmaður flytur tað fram.

51. §.

Tað er tinginum loyvt at beina tey mál, tað ikki leggur í at viðgera, til ráðharrarnar.

52. §.

Lögtingsfundir eru almennir. Forsetin ella so nógvir tingmenn sum tingskipanin fyri setur kunnu tó krevja, at allir sum ikki eru tingmenn fara út; síðan ræður tingfundurin, um málið skal umröðast fyri opnum durum ella afturlatnum.

53. §.

Lögtingið lógfestir gjöllari reglur viðvíkjandi tingsins skipan og mannagongd.

54. §.

Dómsvaldið skal fyriskipast við lóg.

55. §.

Dómsvaldið avger trætumál um valdamarkið hjá gerðavaldi og lóggávuvaldi. Eingin sleppur tó undan at lýða yvirvaldaboð fyribils, tó at hann skjýtur málið til dóms.

56. §.

Dómararnir skulu í embætisvirki sínum einans fara eftir lógini. Dómarar verða ikki settir frá uttan við dóm og flytast ei heldur í annað embæti móti vilja sínum.

Tó kann dómari, ið er vorðin 65 ára gamal, setast frá, men skal hann framvegis hava somu lön.

57. §.

Í Föroyum skulu vera 2 dómstólar, sorinskrivararættur og lögrættur.

Sorinskrivarin skal vera lögfröðingur. Í lögrættinum skulu tríggir lögrættumenn ið allir eru lögfröðingar sita; formaður rættarins

nevnist lögmaður. Tað skal tilskilast við lóg, hvörji sakarmál ið skulu havast upp fyri sorinskrivararætt og hvörji skulu fyri lögrætt, somuleiðis hvörjir sorinskrivaradómar, ið kunnu skjótast inn fyri lögrætt.

58. §.

Tann evangelisk-lutherska kirkjan er tjóðkirkja Föroya og ríkið skal styðja hana.

59. §.

Fólkið eigur rætt til at stovna trúarfelög sum hvör heldur beinast vera.

60. §.

Eingin má lissa nakað av politiskum ella borgarligum rættindum vegna trúar sínar, ikki heldur sleppa undan nakrari borgaraskyldu. — Eingin er skyldugur at rinda gjald til aðra enn sína guðsdyrkan.

61. §.

Hvör tann sum verður tikin av fúta skal, áðrenn samdögur er liðið, stillast fyri sorinskrivara. Ber ikki til at lata hann leysan beinanvegin, skal sorinskrivarin, áðrenn trý samdögur uppaftur eru umliðin, við grundum avgera um hann skal verða settur í varðhald. Ber til at loysa hann móti veðtrygging ger dómarin av hvat og hvussu mikið veðið skal vera.

Ákenning sorinskrivarans kann beinanvegin skjótast inn fyri lögrættin.

Fyri brot ið bert verður revsað við sekt má eingin setast í varðhald.

62. §.

Bústaðurin er friðhalgur. Húsaleit ella bræva- og skjalaranns-sókn má ikki fara fram uttan eftir rættarákenning ella við serstakari lógarheimild.

63. §.

Ognarrætturin má bert skerjast við lóg, og bert til samfelagsframa. Eingin er skyldugur at lata jörð ella aðrar ognarlutir til tað almenna móti fullum endurgjaldi.

64. §.

Eingin útlendingur kann fáa landsborgararætt uttan við lóg. Heimild hjá útlendingum til at eiga fastar ognir í Föroyum skal skipast við lóg.

65. §.

Vunnufrælsið má ikki skerjast uttan við lóg og bert til samfelagsframa.

66. §.

Hann sum ikki kann bjarga sær og sínum hevur, táið eingin annar hevur skyldu til at styðja hann, rætt til styrk frá tí almenna við teimum treytum sum lógin ásetur.

67. §.

Börn öll hava rætt til ókeypis upplæring í fólkaskúllanum.

Tey foreldur, sum fullvæl sjálv eru för fyri at læra upp börn síni, hava ikki skyldu til at seta tey í fólkaskúlan.

68. §.

Hvör maður hevur rætt til at seta sína hugsan á prent; prentfrælsið má aldrin við ritskoðan ella á annan hátt tálmast.

69. §.

Fólkið eigur rætt til at stovna felög við hvörji tilætlan sum lóglig er, og törvar ikki at sökja loyvi til tess.

Felag má ikki loysast upp av stjórnarávum uttan fyribils og tá skal sakarmál havast upp beinanvegin móti felagnum til at upploysa tað.

70. §.

Fólkið eigur rætt til at savnast til fundar. Á almennum fundi hevur fútin heimild at vera hjástaddur. Útifundur kann bannast táið útlit er fyri at ófriður stendst av honum.

71. §.

Sjálvstýrið hjá kommununum undir umsjón stjórnarinnar skipast við lóg.

72. §.

Broytingar- ella uppískoytingaruppskot viðvíkjandi hesari stjórnarskrá kunnu leggjast fyri bæði á regluligari lögtingssetu og á eykalögtingi. Samtykkja 2/3 av lögtingslimunum stjórnarskráaruppskotið skal tað áður enn 2 mánaðir eru gingnir leggjast undir fólkaatkvöðu.

Fær uppskotið tveir triðingar av greiddum atkvöðum og ¾ av lögtingsveljarunum í landinum hava greitt atkvöðu, skal tað staðfestast av forsetanum og er síðan stjórnarskrá.

73. §.

Henda stjórnarskráin gongur í gildi, táið Föroya lögting og fólkaatkvöða hava samtykt á tann hátt sum omanfyri í 72 § er fyriskipaður.

1. útgáva: Föroyingafelag — Felag fyri Föroya frælsi, Tórshavn 1946; prentútgáva.
2. útgáva: Unga Tjóðveldið, Föroyar 2006; netútgáva.

Bókaprent — Tórshavn 1946